LM-099/2023

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

uvmr@uvmr.fo

Fylgiskjal 28

Dagfesting, 20. februar 2024

Viðv. Mál nr.: 23/25395

Hoyringssvar frá Hundaeigarafelag Føroya – HUFF viðvíkjandi uppskoti til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

Tað er serliga § 4, stk. 4, vit sum hundaeigarafelag harmast um, og standa spyrjandi, hví tað skal vera eitt fullkomi forboð móti at hava hundin við sær í hagan.

Tað minsta, ið kann gerast, heldur enn eitt forboð, er at lata avgerðarrættin liggja hjá avvarðandi bónda ella røktingarfólki. Tað eru fleiri, sum ikki hava nakað ímóti, at ein tekur hundin við sær. Sjálvandi við virðing fyri øðrum djórum, lembing, fjalltíð o.s.fr.

Hundar í dag eru so stórur partur av familjuni, at um familjan ætlar sær ein sunnudagstúr í góðveðrinum, ja so sjálvandi ynskir familjan, at hava hundin við sær. Ella um ein ætlar at ferðast í egnum landi og tosar við bóndan um at kunna ganga gjøgnum hagan, ella at sleppa at tjalda í haganum. Við nýggju lógini ber ikki eingongd til at spyrja røktingarfólkið, um mann kann hava hundin við sær, men hundurin skal í ansing, meðan restin av familjuni kann njóta útilívið í Føroyum.

Sigast skal eisini, at fleiri av teimum góðu gøtunum, sum Tórshavnar kommuna hevur gjørt, sum vera brúktar nógv hvønn tann einasta dag, liggja uttangarðs.

Tað eru eisini tey, sum brúka hundin til venjingar/ítrótt, nakrar venjingar krevja so nógv pláss, at tær kunnu ikki gerast aðrastaðni enn í haga, hetta verður heldur ikki gjørligt longur. Vit vilja framhaldandi hava møguleika at gera slíkar avtalur við røktingarfólkið. Sum nú er, kunnu vit gera avtalur um venjingarøki, men um § 4, stk. 4, kemur í gildið í verandi líki, so taka tit allar møguleikar frá okkum hesum viðvíkjandi.

Okkara ynski er, at um verandi áseting skal broytast, at hon verður broytt soleiðis, at tað ikki verður eitt fullkomið forboð, men at avgerðarrætturin verður givin til avvarðandi bónda ella røktingarfólk. So vit hava møguleika at gera avtalur vegna hundaeigarafelagið um venjingarøki, umframt at fólk hava møguleika at spyrja, um tey kunnu taka hundin við sær út í føroysku náttúruna.

Vinarliga heilsan

Hundaeigarafelag Føroya (HUFF)
Maria Bonde Vinter, forkvinna